TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir tveimum pedagogum til Býlingshúsið undir Brúnni.

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 40 tímar um vikuna, í barnagarðsstovu, við 17 børnum og eitt pedagogstarv 40 tímar um vikuna á vøggustovu við 10 børnum.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 15. februar 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Hervør Dam, leiðara, tlf. 31 91 80, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9 B, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. februar 2001.

SNARSKIVAN

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Mazda 323 2.0 diesel, 3 hurðar H/B
**Árg.:** 2000
**KM.:** 3.539
**Lakk:** Myrkagrønt met.
**Eyka útgerð:** Spoylarasett, tokulyktir og píkadekk

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Saltangará
Tlf. 448077
at hitta millum kl. 09.00–11.00

## Ferðastuðul til lesandi uttanlands

Tey, sum byrjaðu lesturin í heysthálvuni, kunnu søkja um ferðastuðul nú. Umsóknarfreistin fyri hesi er 31.07.2001.

Tey, sum byrjaðu lesturin í várhálvuni kunnu ikki søkja um ferðastuðul fyrrenn í august-/septemberr mánaða 2001, og er endaliga umsóknarfreistin fyri hesi 31.12.2001

Umsóknarblað, vegleiðing v.m. til ferðastuðulin lestrarárið 2000/2001 kunnu nú fáast við at prenta hesi frá heimasíðu okkara www.studulsstovnurin.fo ella við at venda sær til stovnin.

Stuðulsstovnurin

Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn
telefon 319680 – faks 355055

## Starv á fiskrannsóknarstovuni

Søkt verður eftir fólki at arbeiða 3/4 dag. Starvið er at gera fyrireikingar, so at aldurin á fiski kann gerast av. Serliga er uppgávan at arbeiða við nytrum, so sum stoyping, upplegging og saging.

Eingi krøv verða sett um útbúgvningar o.t., men til starvið krevst nærlagni og neyvleiki.

Starvið verður lønt í 8. flokki í sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 315092.
Skrivlig umsókn má vera inni í seinasta lagi 5. februar 2001.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Corolla 2.0 Diesel, 4 hurðar Sedan
**Árg.:** des.1999
**KM.:** 23.899
**Eyka útgerð:** Sportsfelgur, radio v/avsp.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Deildin á Saltangará
Tlf. nr. 448190
at hitta millum kl. 09.00–11.00

## Leder for filetavdelingen

Da vår nåværende avdelingsleder skal over i ny jobb i bedriften søker vi **leder for filetavdelingen.** Avdelingslederen har det daglige ansvar for produkt og produksjonsprosessen i avdelingen. Avdelingen har 90 ansatte og avdelingslederen har det daglige personalansvar. Evne og interesse for å lede og motivere vil derfor bli vektlagt Avdelingslederen inngår i bedriftens ledergruppe og rapporterer til produksjonsleder som har der overordna driftsansvar.

Vi søker først og fremst etter en person som har evne og kunnskap i forhold til å lede porduksjon. Der er en fordel med kjennskap til fiskeindustri, men vi oppfordrer også personer som ikke har bakgrunn fra fiskerinæringen til å søke.

Lønn etter avtale. Vi er behjelpelige med å skaffe bolig. Bedriften har egen pensjonsforsikring.

Kontakt produksjonsleder Øyvind Bolle tlf. 78983431/ 97706861 for nærmere information.

Søknad med CV og attester sendes til Havprodukter AS, pb. B, 9990 BÅTSFJORD innen 11. februar.

---

**Havprodukter AS** er en del av konsernet Nordic Sea Holding AS. Havprodukter AS er lokaliseret til Båtsfjord i Finnmark, Norge og har 150 ansatte. Vi producerer konsumprodukter og videreforedlede produkter av hvitfisk for eksport. Bedriften er organiseret i 5 avdelinger, brygge, teknisk, filet, ferdigvare og administrasjon

## Sethús í Tórshavn til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður ongnin Heimaratún 7, Torshavn, við hesum lýst til sølu.

Talan er um eini raðhús við kjallara (hálvum), 1. hædd, 2. hædd og loft. Allar hæddirnar eru umleið 56 m$^2$ til víddar og innrættaðar, tó ikki kjallarin. Húsini standa miðskeiðis í Havnini, og í barnavinarligum umhvørvi. Tekjan er um at vera skift út, og verða húsini seld við nýggjari tekju.

Húsini verða víst fram eftir avtalu.

**Annfinn V. Hansen**
Advokatfirma
Gongin, postrúm 106
FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 95 95
Semil 31 54 99

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192



Toll- og Skattstova Føroya

## Fulltrúi

Søkt verður eftir einum fulltrúa til eftirlits- og innheintingardeildina í Stýrinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

**Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum verða t.d.:**

- ráðgevandi og hjálpandi funktión mótvegis økjunum
- yvirordnað umsiting og serkunnleiki í eftirlits- og innheintingarmálum
- at gera og leggja til rættis innanhýsis veleiðingar- og rundskriv um skatt, meirvirðisgjald, innheinting og tollfakligar spurningar saman við lógardeildini, herundir mannagongdir viðvíkjandi innheinting
- at geva fakliga leiðbeining til økini í sambandi við roknskaparligt eftirlit á virkjum
- vinnugreinaeftirlit og grannskoðan av truplum málum og av málum, sum økini vegna lokalpolitiska ørsøk ynskja at flyta til Stýrið
- at undirvísa starvsfólkum í nýggjum reglum og arbeiðsháttum í virkiseftirliti
- at skifta upplýsingar við útlond
- at gera úrvalsmøguleikar og hjálpiamboð til økini
- at umsita og menna vegleiðing til samskipað eftirlit

**Førleiki:** Umsøkjarar skulu hava roknskaparliga útbúgving, eitt nú merkonom, HA ella aðra hægri roknskapar- ella revisiónsútbúgving. Kunna arbeiða bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum. Umsøkjarar við arbeiðsroyndum hava fyrimun.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir:** Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag. Kravt verður, at tann, ið settur verður, luttekur í útbúgving í styttri og longri tíðarskeið.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Stýrið, Regin Thomsen ella Óla Heinesen, tlf. 35 20 26.

**Umsóknir:** Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2001.

Toll- Skattstova Føroya
Stýrið
Traðagøta 39
Postboks 2151
FO-165 Argir

---

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur hjá landinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna herundir eisini kolvetnisskattalóggávuna. Stovnurin hevur 148 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, sum heldur til á Argjum. Tær 6 økisskrivstovurnar, sum eru á Tvøroyri, í Skopun,

Toll- og Skattstova Føroya

## RÆTTAÐ LÝSING

### Automatisk sjálvuppgáva 2000

Um 15. februar skrivar Toll- og Skattstovan eina skattauppgerð út til persónar, ið meta okkum at hava rættar upplýsingar um í fyribilsskattaskránni.

Tey, sum fáa skattauppgerð á henda hátt, eru persónar undir fullari skattskyldu, og sum í fyribilsskattaskránni 2000

bert hava A-inntøku
og
ikki hava frádráttir
og
ikki sjálvboðin hava ávíst løn gjøgnum skattaskipanina
og
ikki hava eitt persónligt vinnuvirki.

Hesi hava tó skyldu at lata inn sjálvuppgávu, um so er, at upplýsingarnar á skattauppgerðini, tey fáa, ikki eru rættar.

Tey, ið ikki hava annan frádrátt enn eftirlønartrygging, og sum annars lúka omanfyrinevndu treytir, kunnu fáa automatiska sjálvuppgávu/skattauppgerð, um tey innan 1. februar 2001 lata Toll- og Skattstovuni sjálvuppgávu yvir inngoldnað eftirlønartrygging í 2000.
**Skjalprógv skal viðleggjast.**

Sjálvuppgávur fáast á Toll- og Skattstovuni.

**Ognaruppgerð**
Í ár verður ognaruppgerð send øllum skattgjaldarum.
Ognaruppgerðin skal bert sendast innaftur, um broytingar ella rættingar eru. Tó skulu roknskaparskyldug altíð senda ognaruppgerðina innaftur.

**Toll- og Skattstova Føroya**

## Lýsing

Vegna skeiðvirksemi er skrivstovan á Bileftirlitinum í Havn stongd hósdagin **25. januar 2001**.

Sýnshallirnar hava opið sum vanligt.

BILEFTIRLIT FØROYA

**Elin Danielsen**
**Útb. fysioterapeutur**
**Dr. Jakobsensgøta 22**
**100 Tórshavn**
**Tlf. 21 44 77**

O2

stephanssons hús

**ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG**
**HITA · MASSAGU · LINNA**

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

## Kanningarstjóri til Jarðfrøðisavnið

Eitt nýtt starv sum kanningarstjóri á Jarðfrøðisavninum er leyst at seta frá 1. apríl 2001 ella skjótast til ber.

**Arbeiðsøki**
Kanningarstjórin verður leiðari á Kanningardeildini. Gjøgnum virkna luttøku í dagliga jarðfrøðiliga arbeiðinum skal kanningarstjórin samskipa kanningarvirksemið á stovninum.
Kanningarstjórin skal kunna átaka sær ein høvuðsleiklut í at tryggja stovninum eitt jarðfrøðiligt fakumhvørvi á høgum fakligum stigi, sum á nøktandi hátt kann loysa allar viðkomandi oljujarðfrøðiligar eins væl og meira alment jarðfrøðiligar uppgávur og í hesum sambandi eftir tørvi samskifta og samstarva við aðrar heimligar og altjóða kanningarstovnar, oljufeløg og ráðgevarafyritøkur v.m.
Við atliti at umsitingini av oljutilfeinginum og at oljujarðfrøðiligum kanningum í síni heild skal kanningarstjórin somuleiðis kunna átaka sær ein høvuðsleiklut í at tryggja samskipanini av jarðfrøðiliga eftirlitsvirkseminum og í ráðgevingini í sambandi við at leggja til rættis framtíðar útbjóðingarumfør og leitivirksemi í síni heild.

**Krøv til umsøkjaran**
Umsøkjarar mugu hava hóskandi akademiskt prógv innan jarðfrøði og/ella jarðalisfrøði, hollar royndir innan oljuleitingaryrkið og innan jarðfrøðiligt kanningarvirksemi í síni heild umframt góð samstarvs- og leiðaraevni. Kunnleiki til og royndir innan sedimentologiskt og/ella stratigrafiskt arbeiði er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.
Roknast má við einum langtíðarstarvi. Tó verður starvið í fyrstu atløgu tíðaravmarkað frá tveimum til fimm ár, alt eftir hvat partarnir kunnu semjast um.
Fyri at tann, ið settur verður, skal kunna verða við í fyrireikingararbeiðinum fram ímóti teimum fyrstu boriverkætlanunum komandi summar, eigur starvið at verða sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. apríl 2001.
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Martin V. Heinesen, Jarðfrøðisavnið, tlf. 357000, fax 357001, t-bræv martinh@jfs.fo

Jarðfrøðisavnið, sum áður var deild á Føroya Náttúrugripasavni, er nú skipað sum vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálastýrinum. Samstundis virkar stovnurin í kolvetnisumsitingini sum samskipaður partur av stýrinum við ábyrgd fyri øllum jarðfrøðiligum viðurskiftum. Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.

Umsóknir við hjáløgdum CV, avriti av embætisprógvi, frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001. Adressan er: **Jarðfrøðisavnið, Brekkutún 1, Postsmoga 3169, 110 Tórshavn.**